**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Umhvørvis- og vinnumálaráðið**
**uvmr@uvmr.fo**

Tórshavn 25. september 2022

Okkara tilv./Our ref.
/Havbxn-HBF---Ummxli-av-uppskoti-t.docx
Tykkara tilv./Your ref.

## Ummæli av uppskoti um at broyta lógina um loyvisgjald á alivinnu

### Almennar viðmerkingar:

*Lógin broytt fleiri ferðir við sera stuttum skotbrá og avmarkaðari viðgerð.*
Skipanin við loyvisgjøldum er, síðani hon kom í gildi, broytt fleiri ferðir við sera stuttum skotbrái og við sera avmarkaðari viðgerð. Nú liggur so aftur ein broyting á borðinum, har hoyringsfreistin er góðar tveir arbeiðsdagar. Havbúnaðarfelagið hevur fyrr víst á, at tað ikki er í lagi at gera slíkar týðandi broytingar í karmunum hjá alivinnuni í skundi. Harumframt eigur tað ikki at vera stuttsiktaði tørvurin í sambandi við eina fíggjarlóg sum avger, hvat alivinnan rindar í loyvisgjaldi.

*Eitt ov høgt tøkugjald ávirkar hugin og møguleikarnar at gera íløgur*
Havbúnaðarfelagið vil gera vart við, at alivinnan er kapitaltung vinna. Íløgurnar, sum eru framdar seinastu árini, hava verið avgerandi fyri stóru framgongdina í føroyskari alivinnu. Ein beinleiðis avleiðing av einum ov høgum tøkugjaldi er, at tað ávirkar hugin og møguleikarnar at gera íløgur í føroyska alivinnu, og tað fer at seta framgongdina í váða. Við uppskotnu broytingunum kemur alivinnan at gjalda tað sum á leið svarar til dupultan partafelagsskatt til landskassan. Harumframt kemur so vinningsbýtisskatturin. Tá altjóða marknaðarprísurin er lágur og nærkast framleiðslukostnaðinum, kunnu gjøldini frá alifeløgunum til almennu kassarnar fara upp um 100% av úrslitinum áðrenn tøkugjald og partafelagsskatt.

*Óstøðugir karmar minka um íløguhugin*
Tað hevur eisini týdning fyri íløguhugin í vinnuni, at skattligu karmarnir eru støðugir. Skiftandi skattaskipanir gera tað torført at meta, um ein ávís íløga loysir seg ella ikki. Tað sigur seg sjálvt, at við óforútsigiligum skattligum kørmum kring alivinnuna minka sannlíkindini fyri, at ein íløga yvirhøvur verður framd.

*Stórur partur av yvirskotinum fer til íløgur*
Tá tøkugjaldið verður umrøtt í almenna orðaskiftinum, verður ofta kjakast um, hvat alivinnan hevur ráð at rinda og ikki. Tað er einki dulsmál, at alivinnan seinnu árini hevur góð úrslit at vísa á, men tað verður sjáldan víst á, at stórur partur av yvirskotinum fer til íløgur, sum økja framleiðsluna og minka lívfrøðiliga váðan í føroyskari aling. Seinnu árini hevur talan verið um so stórar íløgur, at summi ár hava samlaðu íløgurnar verið størri enn sjálvt ársúrslitið hjá alifyritøkuni.

*Nýggjastu íløgurnar váðafullari og hava lægri avkast*
Tað er tó munur á íløgum. Fyrstu íløgurnar í alivinnuni eru tryggastu íløgurnar, sum hava minst váða við sær. So hvørt sum best egnaðu aliøkini verða upptikin, krevur tað váðafullari og ofta størri íløgur fyri at kunna halda fram við at økja um framleiðsluna, eitt nú við stórum smolti, út á streymharðan sjógv ella á opið hav. Framleiðslukostnaðurin er hægri á nýggjastu aliøkjunum og við nýggjastu alitøknini. Eitt ov høgt tøkugjald kann tí gera tað órentabult at fremja hesar íløgur.

Slíkar íløgur eru eisini meira váðafullar, tí tøknin er ikki eins roynd. Dømi um hetta er aling í lokaðum eindum, og íløgur í aling á streymharðum økjum og opnum havi. Ovurhonds stórar íløgur sum – um tær rigga – kunnu flyta føroyska aling framá í stórum lopum. Men sum hinvegin eisini kunnu hava stór tap við sær, um tær ikki fáast at rigga sum ætlað.

*Vøkstur í alivinnuni skapar ringvirkningar kring landið*
Føroyska alivinnan hevur seinastu árini økt um framleiðsluna og skapt nógv nýggj størv kring alt landið, bæði í alivinnuni sjálvari og hjá undirveitarum, umframt at alivinnan hevur goldið alsamt meira í partafelagsskatti, tøkugjaldi og vinningsbýtiskatti.

Sjálvt við óbroyttum tøkugjaldi kunnu vit vænta, at gjaldið frá alivinnuni til almennu kassarnar eisini fer at økjast komandi árini, so hvørt sum framleiðslan í alivinnuni væntandi økist. Fortreytin fyri hesum er, at skattliga skipanin ikki køvir íløguhugin.

*Stór óvissa á altjóða marknaðunum*
Óvissan í heimsbúskapinum kastar myrkar skuggar yvir framtíðarvánirnar. Samstundis eru allir kostnaðir hækkaðir við risalopum, eins og fíggjarkostnaðirnir hækka. Hetta viðførir, at sjálvt høgir laksaprísir í 2023 ikki fara at geva sama avlop hjá alifyritøkunum, sum frammanundan. Havbúnaðarfelagið metir tað vera sera álvarsamt um vit í hesum sera óvissu tíðum fáa stein oman á byrðu við einum enn hægri tøkugjaldi.

*Skipanin við loyvisgjaldi eigur at verða grundað á skattliga úrslitið*
Havbúnaðarfelagið ynskir sær eitt tøkugjald grundað á skattliga úrslitið, tí hetta ikki økir eins nógv um váðan sum verandi tøkugjald, sum er eitt sølugjald. Hetta hevði eisini loyst trupulleikan við, at íløgurnar sum verða gjørdar fyri at økja um alingina í Føroyum eru váðafullari og hava eitt lægri forvæntað avkast enn verandi framleiðsla. Havbúnaðarfelagið kundi harumframt hugsað sær, at ein slík skipan varð grundað í einari breiðari politiskari semju, so minni óvissa verður um skattligu karmarnar um alivinnuna.

**Tað er ein sannroynd, at laksaalivinnan rindar fyri rættin at ala á føroysku firðunum, men eitt ov høgt tøkugjald hevur avleiðingar fyri íløgurnar, sum verða framdar – og tað rakar ikki bara alivinnuna, men gevur eisini ringvirkningar út í samfelagið.**

**Serligar viðmerkingar**

*Til broyting nr. 1-5:*
Sum Havbúnaðarfelagið vísir á í almennu viðmerkingunum, heldur felagið at loyvisgjøldini eiga at taka støði í skattliga úrslitinum. Er undirtøka ikki fyri hesum, mælir felagið til, at heldur enn at áseta eitt ávíst krónutal í lógini, so eigur samlaði framleiðslukostnaðurin hjá føroysku laksaalivinnuni at verða roknaður á hvørjum ári, og so kunnu markvirðini fyri ymisku prosentgjøldini verða sett í mun til henda framleiðslukostnað. T.d. sum samlaðan framleiðslukostnað + 5 kr o.s.fr.

Harumframt heldur Havbúnaðarfelagið, at einki loyvisgjald eigur at vera goldið, tá undirskot er av framleiðsluni (áðrenn skatt og tøkugjald). Tí heldur Havbúnaðarfelagið, at loyvisgjaldið eigur at vera 0%, tá altjóða marknaðarprísurin á Fish Pool er undir framleiðslukostnaðinum.

Eisini heldur Havbúnaðarfelagið tað vera rímuligt, um alivinnan hevur møguleika at hava eitt ávíst yvirskot, áðrenn feløg í vinnugreinini skulu gjalda fleiri prosent í tøkugjaldi. Tí verður mælt til, at loyvisgjaldið á 2,5% upp til framleiðslukostnað + 5 kr, verður broytt til 0,5%. Eisini verður mælt til at markvirðini á tveimum teimum ovastu stigunum verða lyft nakað, so man t.d. ikki rindar 10% av søluvirðinum í tøkugjaldi, uttan so at talan er um heilt serlig viðurskifti á marknaðinum.
Í hesum sambandi skal vísast á, at føroyska alivinnan longu frammanundan broytingunum er millum tær harðast skattaðu av øllum alitjóðum í heiminum, og sannlíkt tann harðast skattaða.

*Til broyting nr. 6:*
Havbúnaðarfelagið tekur undir við at broyta dato til 1. november. At tað stendur 1. oktober í lógini er helst ein feilur.

*Til gildiskomuna*
Í lógartekstinum stendur, at lógin kemur í gildi dagin eftir hon er samtykt. Í viðmerkingunum stendur, at lógin kemur í gildi 1. Januar 2023. Helst er ætlanin, at hon skal koma í gildi 1. Januar 2023.

*Til almennu viðmerkingarnar:*
Tað verður í viðmerkingunum nevnt, at landskassin væntar at fáa 74,7 mió kr. meira frá loyvisgjaldi í 2023 og 27,3 mió meira í 2024 í mun til verandi skipan, um uppskotið, sum varð sent til hoyringar verður óbroytt. Havbúnaðarfelagið kennir ikki grundarlagið fyri hesum metingum.

Nýggja skipanin røkkur tó fleiri ár fram í tíðina, og Havbúnaðarfelagið heldur tí, at tað eigur at verða upplýst, at henda meirinntøka kann hækka í árunum eftir 2024, um laksaprísurin heldur sær omanfyri framleiðslukostnað +15 kr/kg. Er altjóða laksaprísurin t.d. 60 kr/kg, verður efitr uppskotinum goldið 2,5% meira (kr 1,50 meira) fyri hvørt framleitt kilo í mun til verandi skipan.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Um roknað verður við einari framleiðslu á 100 tús. tons økist samlaða loyvisgjaldið frá føroysku laksaalivinnuni tá við 150 mió kr. um árið í mun til verandi skipan, tá nýggja skipanin í uppskotinum er fult íverksett.

Vinarliga
Nevndin í Havbúnaðarfelagnum

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo